# Tómir heilar í Mentanarhúsinum

**- Har du ikke hørt, at man skal ikke drikke på tom hjerne, spurdi Amin Jensen ein av teimum meira aktivu áskoðarunum í Mentanarhúsinum leygarkvøldið**



*Amin Jensen í Mentanarhúsinum í Fuglafirði ger gjøldur burturúr øllum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

BLÆS PÅ DK

*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Amin Jensen hevði eina neyðbremsu, um tað skuldi blivið ov nógv av tí góða fyri føroyingin.

- Blaka hondklæðið inn á pallin, um eg verið ov grovur ella naskur, segði Amin Jensen við ein áskoðara á fremru rekkjunum og gav honum eitt hondklæði.

So var støðið lagt og áskoðarin visti, at alt mundi ikki fara at verða borðbært í kvøldsins framførslu hjá Amin Jensen í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

- Der er børn til stede. Så må jeg hellere beherske mig, segði Amin.

- To lesbiske nonner tog på værtshus...

Og so steðgaði Amin við nonnusøguni, flennandi, tá maðurin við handklæðnum var um at blaka.

*"Kilovulkan i udbrud!" "Amin Jensen sprutter og sprudler i sit bedste show til dato!!" "Fem stjerner med pil opad!!"* - Ekstra Blaðið

## Størri enn nakrantíð

Tey, sum høvdu sæð Amin Jensen fyrr, mundu helst ásanna, at maðurin var betri og frekari enn áður. Ummælarar í Danmark eru mest sum á einum máli um, at hetta er tað besta, sum vit hava sæð frá Amin Jensen higartil.

*"Der fyger med hurtige one-liners fra scenen." "Åbningsnummeret sparkede benene væk under publikum."* - BT

Sjálvironiski danin var ikki bangin fyri at leggja fingrarnar ímillum, tá hann flenti og gjørdi gjøldur burtur úr mongum kendum dana. Tær smáu vittigheitirnar vóru eisini mangar í tali.

- Min kæreste er 12 år, segði 35 ára gamli Amin.

- Yngre end mig, legði hann afturat.

## Ónøgdur, ótolin, og ófólkaligur áskoðari

Amin Jensen skuldi koma á pallin í Mentanarhúsinum klokkan 20:00. Men tað dró út. Har kom ongin maður. Klokkan 20:05 hoyrast róp frá aftastu røð. Ein áskoðari er eftir øllum at døma ónøgdur og ótolin.

- Kom så igang, mand.

- Hvad sker der?

- Kom så for helvede i gang, mand.

Ein føroyingur á fremstu røð svarar aftur.

- Hold kæft, segði føroyingurin.

So reisir danin seg har afturi. Tað sæst, at hann er í rockara-klæðum, hevur langt hár, yvirskegg, og svartar sólbrillur. Hann gongur upp ímóti pallinum, framvegis rópandi og spyrjandi um, hvar hasin feiti danin blívur av.

- Kom så for helvede i gang, dit fede læs, rópar rockarin.

*"Amin er rå, men hele tiden med charme på læberne, og i glimt har han endda en næsten Victor Borgesk timing."* - Se & Hør

## Tann veruligi Amin

Látur var um allan salin, tí nú høvdu tey flestu skilt, at tað var sjálvur Amin Jensen, sum hevði sett hol á sítt provokerandi show. Rockarin stóð á pallinum eina løtu og provokeraði áskoðararnar og bað um "respekt, mand."

Síðani rýmdi hann av pallinum, og ein Amin Jensen-líkur persónur kom inn á pallin og framførdi ein sang. Og so kom tann stóra løtan, tá ein hamskiftur Amin Jensen trein inn á pallin við gittara og loysti frá landi við góðum sangi.

## Áskoðari svarar aftur

Stóri danin fekk eina flúgvandi byrjan upp á sítt show í Føroyum. Áskoðararnir vórðu skjótt tendraðir, og Amin Jensen sjálvur tóktist vera í stórformi.

Ein áskoðari sigur brádliga okkurt um, at "Amin Jensen, du sveder."

Amin er beinanvegin klárur og hermir eftir ákoðaranum. "Du schweder," sigur Amin á fullamansmáli og flennir.

- Har du ikke hørt, at man skal ikke drikke på tom hjerne, spyr Amin áskoðaran, og salurin er um at bresta. Hetta varð ikki niðurafturlagt gjøgnum alla framførsluna.

## Nakin endi

Móti endanum av framførsluni av Blæs på DK kastaði Amin Jensen eina bumbu. Hann fór av pallinum, men løtu seinni kom hann dansandi hálvnakin innaftur á pallin. Tá kókaði yvir í tí knapt fultsetta Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og fólk skræddu seg av látri. Ein stórur og kátur og hálvnakin maður, lættur á fótum, setti eitt stórt punktum fyri einari megnarframførslu.

## Varð nakar stoyttur?

Amin Jensen hevur áður sagt, at føroyingar eru ómetaliga ærukærir eins og bornholmarar, men at føroyingar samstundis eru sjálvironiskir.

- Tað dámar mær stak væl. Eg haldi eisini, at eg sjálvur líkist føroyingum, og tað er kanska tað, sum ger, at eg kenni meg so mikið væl móttiknan og væl tilpassaðan í Føroyum, sigur Amin Jensen.

Ummælarin hevur varhugan av, at føroyingar eisini hesuferð tóku væl ímóti Amin Jensen, sum eisini framførdi á ólavsøku í fjør. Hesuferð lá stóri danin allatíðina á markinum – kanska fiskaði hann innanfyri markið einaferð ella tvær ferðir -- og hann megnaði sera væl at rokna seg fram til, hvat føroyingurin toldi og hvat føroyingurin ikki megnaði at svølgja.

"Á markinum" var lykilin, og tað kann hugsast, at hjá onkrum varð markið flutt leygarkvøldið, tá Mentanarhúsið gjørdi pláss fyri stóra Amin Jensen. Vónandi traðkaði hann ikki á føturnar hjá nøkrum, tí vit vilja fegin hava Amin Jensen aftur á klettarnar skjótt.



*Nærum toppleysur men í toppformi. Amin Jensen var ein stórur biti at gloypa til tíðir, men framførslan í Mentanarhúsinum var uttan iva ein tann besta, sum vit hava sæð*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Amin Jensen** var 23 ára gamal, tá hann fyrstu ferð framførdi á palli. Tað var í 1993. Eftir nøkrum mánaðum varð hetta hansara livibreyð, og Amin Jensen hevur síðani tað havt einar 1.700 framførslur kring Danmark. Flestu føroyingar kenna Amin Jensen sum vældámda vertin frá Hit Med Sangen.